

*Sølan av fiskamati í donskum fiskahandlum vaks við 30% í fjør*

## Uppskriftir fáa fólk at eta meira fisk

**Danmark:** Danska Fødevareministeriið hevur saman við ES stuðlað einum "uppfylgjara" av bókini, "Fiskur tvær ferðir um vikuna", sum fekk dygga undirtøku millum fólk í fjør. Uppfylgjarin er ein ókeypis bók við fiskauppskriftum.

Í bókini hesaferð, sum í fyrsta lagi er prentað í 700.000 eintøkum, eru lekrar vikuskiftis-uppskriftir við fiski.

Kanningar vísa, at bert 16% av dønum eta fisk sunnu-og halgidagar.

Sambært danska ráðharranum, Hans Chr. Schmidt, vaks sølan av fiski í donskum fiskahandlum við 30% í fjør, og danir ivast ikki í, at bókin hevur havt sína ávirkan á øktu søluna. **(-vilmund)**

## Meldaðir fyri at hava ov lítla manning

**Frakland:** Skip, sum fiska brisling og sild í Eystursjónum, bróta reglurnar um manningartal.

Tað sigur svenska vaktartænastan.

Tvey av skipunum, sum hava siglt við ov lítlari manning, eru nú meldað til løgregluna.

Skipini fiskaðu suður úr Gotlandi við einans trimum monnum umborð. **(-vilmund)**



*Tað tekur burtur av hjá teimum, sum skulu liva av útróðri burtur av, at ein og hvør kann seta línu heilt í klettin. – Eg haldi, at øll útróðrarfør, sum royna við línu, sum heild skuldu farið út um einar 3-4 fjórðingar, sigur bátaeigari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

sleppur inn á friðaða økið, leggur hann aftrat.

Bátaeigarin heldur at enda, at royndin við línu er vorðin so ógvuslig, at neyðugt er at fremja avmarkingar til tess at verja smáfiskin.

**Longur út**

Hjalti í Jákupsstovu, leiðari á Fiskirannsóknarstovuni, er samdur við bátaeigaranum um, at neyðugt er at seta í verk avmarkingar fyri línuveiðina fram við landi.

– Vit hava eisini í okkara tilmæli til myndugleikarnar mælt til, at tey smærru útróðrarførini ikki sleppa heilt inn undir land at seta. Hetta vístu vit serliga á í okkara seinasta tilmæli.

Hjalti sigur, at tað liggur í náttúruni, at tað er tann smái fiskurin, sum heldur seg inni við land, og tískil er hesin fiskurin eisini útsettur fyri harðari veiði, tá royndin er so stór.

Hann vísir á, at línuskipini sleppa ikki inn undir land at royna, men skulu halda seg uttanfyri 6 fjórðingar.

– Hinvegin er einki mark fyri, hvussu nær teir smáu útróðrarbátarnir kunnu royna, og tað halda vit ikki vera rætt, sigur Hjalti í Jákupsstovu.



*Alt bendir á, at roysningur trívist og mennist á Svalbard. Tað visa nýggjar teljingar*

## Roysningur trívist á Svalbard

**Um nøkur ár fæst at vita, hvussu stórur vøksturin í stovninum í veruleikanum er**

**Svalbard:** Nýggjar teljingar av roysningi við Svalbard visa, at stovnurin er í vøkstri. Mett verður, at talið av dýrum liggur um 2500.

– Vit hava talt roysning við Svalbard í sambandi við eina verkætlan, sum hevur fevnt um fýra ár. Vit eru ikki heilt liðug enn, men fyribils úrslitið av teljingini bendir á, at tað eru einir 2500 roysningar á Svalbard.

Christian Lydersen, sum starvast hjá Norsk Polarinstitut, sigur, at um eini fimm ár ber til at siga við vissu, hvussu nógv stovnurin veksur.

– Um fimm ár verður ein nýggj teljing, leggur hann aftrat. **(-vilmund)**

# Royndir við nýggjum rækjutroli

**Nú rækjuprísirnir eru lutfalsliga lágir, samstundis sum oljan er dýr, halda menn, at rækjuveiða við stórum skipum ikki er serliga lønandi longur**

RÆKJUVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskeri-og Havbruksnæringens Forskningsfond hevur játtað stívliga 2 miljónir krónur til framhaldandi menning av einum nýggjum rækjutroli. Ætlanin er, at nýggja trolið skal roynast umborð á tveimum ymiskum trolarum uppi í Barentshavinum tíðliga í summar. Á henda hátt verður hildið, at til ber at finna út av, hvussu effektivt trolið er, og hvussu nógv skal til fyri at draga tað gjøgnum sjógvin.

Nýggja rækjutrolið er roynt í stóra tanganum, SINTEF í Hirtshals í Danmark.

Dýra oljan er ein beinleiðis orsøk til, at neyðugt er við nýggjum trolum, sum eru lættari at draga ígjøgnum sjógvin.

Tað eru tey, sum siga, at rækjuveiða við stórum skipum rætt og slætt ikki er lønandi longur, nú rækjuprísirnir eru lutfalsliga lágir, samstundis sum oljan er vorðin so dýr.



*Royndir við troli í royndarhyli*